# Umfatandi skúlaútbygging í Kollafirði

**Bygt verður um og út í Kollafjarðar skúla fyri einar 20 milliónir krónur. Nakrar serstovur koma afturat, og eisini verður eftir summarfrítíðina rúm fyri framhaldsdeild, soleiðis at kollfirðingar, sum ganga í framhaldsdeildini, tá fara at sleppa undan at fara til Havnar**

SKÚLAÚTBYGGING
*Edvard Joensen*



*Í seinastu viku var bygningurin millum skúlan og ítróttarhøllina í Kollafirði reistur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Kollafirði:** Skúlaumstøðurnar í Kollafirði fara at gerast nógv betri eftir summarfrítíðina. Ein umfatandi út- og umbygging av verandi skúla er í gongd í løtuni. Væntandi fer øll verkætlanin at kosta einar 20 milliónir krónur, sigur Karin Hammer, skúlaleiðari.

Kollafjarðar skúli var vorðin ov lítil til teir umleið stórthundrað næmingarnar, sum í løtuni ganga í skúlanum. Tala er um næmingar frá fyrsta til sjeynda flokk. Næmingarnir, sum ganga í framhaldsdeildini, ganga í løtuni í skúla í Havn.

Men nú bygt verður út, fær skúlin umframt serstovur og felagshøli eisini tríggjar vanligar floksstovur afturat, sigur Karin Hammer. Og tær tríggjar stovurnar fara so at verða nýttar til sjeynda til níggjunda flokk. Ætlanin er ikki at hava tíggjunda flokk í Kollafirði, sigur Karin Hammer.

Byrjað verður eftir summarfrítíðina í ár við einum áttanda flokki. Tey, sum í løtuni ganga í níggjunda og tíggjunda flokki í Havn, verða kortini verandi har og gera seg liðug, sigur hon.

Útbyggingin umfatar ein bygning millum verandi skúla og ítróttarhøllina, og ein tilbygning úteftir tann vegin, sum parkeringsplássini til læknaviðtaluhølini vóru út móti ánni. Eisini verður umbygt inni í sjálvum skúlanum, sigur skúlaleiðarin. Arbeitt verður, bæði meðan børnini eru í skúla og eisini eftir skúlatíð.

– Tað er greitt, at tað larmar illa, meðan arbeitt verður, og tað hoyra børnini sum vera man, sigur Karin Hammer. Nakað av dusti hevur eisini órógvað eitt sindur, men tað er nógv betri við tí nú, sigur hon. Meðan bygt hevur verið um, eru tveir flokkar fluttir úr skúlanum. Annar heldur til í skótahúsinum, og hin í bygdarhúsinum.

Umframt tær tríggjar skúlastovurnar fáa tey eisini nýggj felags- og umsitingarrúm umframt serstovur í tí tilbygninginum, sum verður bygdur út móti ánni. Øll miðan er tikin burtur og verður, saman við tí tilbygninginum, sum bygdur verður niðan móti ítróttarhøllini, umbygd til sonevndan námsfrøðiligan tænastudepil, sigur skúlaleiðarin.

Í seinastuni hevur nakað verið tosað um skúlakost og serliga um kantinur í skúlanum. Men kantina er ikki við í uppruna ætlanini í sambandi við hesa stóru útbyggingina í Kollafirði, sigur Karin Hammer. Men arbeitt verður við onkrum, sum væntandi kann fara at hjálpa upp á tann mangulin, sigur hon.

# Norröna fær ikki fólk

**Føroyingar vilja ikki sigla við Norrönu. Smyril Line hevur søkt eftir manning til summarsiglingina, men bara ein føroyingur søkti**

SIGLING
*Edvard Joensen*




*Seinast søkt varð eftir fólki til Norrönu, var bara ein føroyingur, sum helt tað vera nóg attraktivt at sigla við hesum stolta fari*

Norröna tykist ikki nóg attraktiv hjá føroyingum at sigla við. Bara ein føroyingur svaraði upp á lýsingar, sum Smyril Line hevur havt eftir fólki til flaggskip okkara.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa viðmerking frá manningarleiðaranum á Smyril Line, men tekniski leiðarin váttar fyri Sosialinum, við manningarleiðaranum sum keldu, at tað kom bara eitt føroyskt svar til ta lýsingina, sum Smyril Line herfyri hevði eftir fólki til Norrönu.

– Hvørjum tað kemst av, kunnu vit so bara gita okkum til, sigur Jógvan í Dávastovu, tekniskur leiðari hjá Smyril Line. Men sjálvur meti eg ta viðgerðina, felagið hevur fngið í pressuni í seinastuni, sum eina grund til, at fólk ikki hevur so mikið álit á okkum, at tey tora at søkja starv umborð á Norrönu, sigur hann.

Jógvan í Dávastovu leggur dent á, at her verður tosað um hotelmanning. Lyklapersónarnir umborð á Norrönu, bæði á brúnni, í maskinuni og í móttøkuni, eru kortini føroyingar, sigur hann.

## Polakkar umborð

Nakrir av teimum føroyingunum, sum kortini eru við Norrönu, vórðu mánadagin sendir í land at avspáka, meðan skipið er í Íslandi. Tað dámdi teimum so mikið illa, at teir kærdu avgerðina til Fiskimannafelagið, sum umvegis sjómannadeild sína umboðar tey fakliga.

Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum, váttar, at fólk av Norrönu hevur vent sær til felagið, og at felagið hevur sent Smyril Line eitt bræv um málið.

Talan var um, sigur Óli Jacobsen, at fólk, beint áðrenn skipið kom til Havnar mánamorgunin, fingu at vita, at tey skuldu í land at avspáka og koma umborð aftur, tá farið varð aftur til Danmarkar seinni í vikuni.

Tey mettu ikki, at henda tilrættaleggingin var nóg góð og kendu seg eitt sindur ótrygg, sigur fiskimannafelagsformaðurin.

Fiskimannafelagið hevur hjá Smyri Line gjørt vart við hetta og heldur tað vera keðiligt og óheppið at skapa óneyðuga órógv hjá manningini.

– Felagið fær sum so ikki gjørt stórt meira við málið í løtuni, sigur Óli Jacobsen.

## Ov lítið fólk við

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa orð á manningarleiðaran hjá Smyril Line, áðrenn blaðið fór til prentingar. Óli Hammer, stjóri, segði seg ikki kenna nóg væl til málið, til at hann vildi gera viðmerkingar.

Jógvan í Dávastovu, tekniskur leiðari, segði tó við Sosialin, at talan var um vanliga avspáking, tí mett varð ikki, at tað var neyðugt at hava fulla manning umborð á Íslandstúrinum, tí so fá ferðafólk vóru við til Íslands.

Hann metti ikki, at tað var nakar vansi í tí, at teir polakkarnir, sum komu umborð í Hanstholm, tóku yvir eftir føroyingarnar, sum fóru í land. Og so vítt hann visti, segði Jógvan í Dávastovu, var einki føroyskt ferðafólk við á túrinum.